# ítróttur

Nr. 159 • týsdagur • 26. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## KÍ leikari kann fáa langt leikbann

**Eftir at hava gjørt seg inn á hjálpardómaran eftir eina útvísing, tykist Erling Flest nú standa til eitt longri leikbann**

LEIKBANN
*Jákup*



*Erling Flest fær eftir øllum at døma eitt longri leikbann eftir hendingina í dystinum móti Sumba. Stóri spurningurin í málinum tykist tó vera, hvørji fordømi skulu nýtast í hesum*

*Savnsmynd*

Tað var rættiligt rok á vøllinum, tá Sumba var á vitjan hjá næst bestu klaksvíkingunum seinasta vikuskifti.

Dysturin endaði við einum tryggum 4-1 sigri til klaksvíkingar, og meira enn nakar annar var tað Erling Fles, sum var í fokus. Fyrst og fremst tí hann við einum hat-trick var høvuðsmaðurin aftan KÍ-sigurin, men seinni í dystinum fekk hann reyða kortið, og tann hendingin fær nú eftirspæl.

### Tók í hjálpardómaran

Sjálv hendingin, har reyða kortið kom á loftið, verður ikki søgd at vera av teimum grefligastu. Talan var um eina eftirtackling, sum dómari og hjálpardómari í felag mettu svaraði til ostaskorpuna, men hetta hóvaði ikki leikaranum. Sum skilst eisini tí talan undan hesum hevði verið um fleiri aðrar álvarsligar samanbrestir, sum ikki fingu tilsvarandi revsing.

Í frustratión um dómin legði leikarin seg inn á linjudómaran, og so kom øði í grindina. Leiðarar hjá bæði Sumba og KÍ vóru alt í einum at síggja í rokanum, og nú verður tað so upp til kappingarnevndina hjá FSF at gera av, hvørja avleiðing málið skal fáa.

Um ikki annað, so hevur kappingarnevndin helst eina gjølliga frágreiðing um málið. Niklas á Líðarenda var nevnliga eygleiðari til dystin, og umframt at vera dómari og eygleiðari, er hann eisini næstformaður í FSF og limur í kappingarnevndini, so ivaleyst verður hendan frágreiðingin eitt hitt mest týðandi próvførslan i málinum.

### Hvørji eru fordømini

At leikarin fær drúgt leikbann, er lítið at ivast í. Vanliga hava mál, har leikari ger seg inn á dómara, viðført upp til níggju daga leikbann, og spurningurin er so, hvørt tað hevur skapt broytta siðvenju, at drúgva málið viðvíkjandi einari útvísing hjá Jóhannis Joensen fyri tveimum árum síðani hevur skapt fordømi. Tá varð skrivað í dómarafrágreiðingina, at leikarin hevði gjørt seg inn á dómaran – sum júst var Niklas á Líðarenda. Leikarin seg einki hava gjørt, og alt endaði við onkrum slag av millumloysn, har leikarin fekk fýra daga leikbann.

Kappingarnevndin hjá FSF hevur fund um málið týsdagin, og fyrr enn tá fæst einki at vita um eina møguliga revsing. Heldur ikki um, hvørt talan kann verða um atgongubann, bót ella einki av nøkrum til leiðararnar, sum komu inn á vøllin. Serliga hetta seinna kann ferast ein áhugaverdur spurningur, tí enn eru eingi fordømi fyri hesum, tó at FSF fyri trimum árum síðani gav til kennar, at tá slík mál vórðu á skránni, eigur felagið at gera sum mest fyri at finna útav, hvat veruliga hevur gingið fyri seg.

At fundurin ikki hevur verið hildin fyrr enn nú, kemst sambært formanninum i kappingarnevndini, Karl Vidtfeldt, av, at ein av nevndarlimunum hevur verið burturstaddur seinastu vikuna, og tá leikarin kortini hevði leikbann, varð tað hildið skilabest at bíða við avgerðini, til nevndin aftur var fullmannað.

## B68 trýr upp á møguleikan

**Toftamenn tykjast nú vera í ferð við at toga seg uppeftir á stigatalvuni**

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Alt síðani tað 17. mai varð farið undir landskappingina í 2. deild hevur uppflytaraliðið av Toftum røkt aftasta sessin. Tað gera teir framvegis, men nú eru ávísar ábendingar um, at teir kanska ætla sær burturúr sessinum, sum ber beinleiðis niðurflyting við sær.

Leygardagin vunnu teir annan heimasigurin á rað, teir hava sjey stig, og nú er níggjunda plássið ikki longri burtur enn so, enn at tað væl ber til at røkka tað í teimum seks umførunum, sum eru eftir, áðrenn 2. deild fer í vetrarfrí 4. oktober.

Leygardagin høvdu teir vitjan av KÍ, sum møtti við heilt øðrvísi og ikki so eyðsýndum liði, sum teir høvdu spælt við leygardagin frammanundan, tá ið teir vunnu á heimavølli ímóti Sumba.

KÍ, sum hevði spælt fimm ferðir á rað uttan at tapa, hevði í 1. hálvleiki fleiri góðar møguleikar, men tað eydnaðist ikki Olgari Danielsen og Helmar Lassen at fáa bóltin í málið aftanfyri Mortan Hansen.

Dygst undan steðginum skoraði Aksel Højgaard. Long sending stakk í vøllin, veteranurin smekkaði til úr høgru, og bólturin smoygdi sær undir handaru samankomingini.

Í 2. hálvleiki var heimaliðið omaná. Uppløgdu málmøguleikarnir vóru ikki so nógvir, men í 70. minutti økti B68 um leiðsluna. Málskjútti var unglingaspælarin Óli Olsen. Hann potaði bóltin inn um John William Joensen, sum saman við Sámal Eyðfinn Akursmørk tóktist hava tak á støðuni.

Síðstu løtuna royndi KÍ at leggja trýst á, og tíggju minuttir undan leikloki kom spenningur í aftur. Jákup Hansen, sum tveir minuttir frammanundan hevði loyst David Bertholdsen av, royndi seg við skoti úti frá, bólturin tók í ein verjuspælara og snýtti Mortan Hansen. KÍ royndi at stríða seg til eitt stig, men tað eydnaðist ikki. B68 verjan við Mannbjørn Nesá og Ova Magnussen á odda megnaði at halda tætt, og hvør veit. Kanska fer tað at eydnast hjá B68 at varðveita næstbesta liðið í næstbestu deildini. Klaksvíkinar høvdu sett nøsina upp eftir at koma á bronsuplássið. Tað miseydnaðist hesa ferð.

### Dysturin í tølum

B68–KÍ 2–1(1–0)
1–0: Aksel Højgaard 45.
2–0: Óli Olsen 70.
2–1: Jákup Hansen 80.



EB/Streymur-FS Vágar 4-2 (2-2):

## Fáir kjansir men nógv mál

**Vágamenn harmaðust um, at teir aftur mistu stig á stokkinum, meðan teir hjá EB/Streymi nú aftur hava otað seg heilt nær ovaru hálvu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað hevur í mangar mátar verið stuttligt at verið fótbóltsáskoðari á Eiðismøl í ár. EB/Streymur, sum jú heldur til her, hevur í ár gjørt upp við leiklutin sum lið í avgjørt tyngra endanum, og longu tá farið varð í summarfrí var niðurflytingarvandin helst fjarðari, enn hann nakran tíð plagdi at vera.

Kanska hevur tað ikki verið tosað serliga hart um tað, men okkurt tutl hevur tó eisini verið um, at møguliga kundi ein støða uppi ímóti heiðursmerkjunum eisini koma upp á tal. Ein støða, ið sum eykavinning eisini kundi bera inter-toto fótbólt við sær.

### Dreymabyrjan

Skuldi dreymurin um hetta halda fram, so var neyðugt við trimum stigum, nú FS Vágar kom á vitjan.Stigini komu eisini, men tað skal verða sagt beinanvegin, at dysturin sum so ikki minti so nógv um eina uppgerð millum tvey lið, har annað strembar eftir ovaru hálvu, meðan hitt alt meira líkist einum, sum fær tveir eyka dystir til at verja støðuna í bestu deildini.

Ella kanska var tað júst tað, sum hann minti um. Hjá vágamonnum hevur talan nevnliga í nógvar mátar verið um somu troystarsleysu støðu, sum A-landslið okkara er í EM-undankappingini. Mest sum hvørja ferð teir eru farnir av vøllinum, hevur tað verið við kensluni um, hvussu nær við stigini vóru, men mest sum hvørja ferð er alt kortini endað við, at mótstøðumenninir eru farnir avstað við tí mesta.

Hesa ferð kundi liðið annars valla fingið betri byrjan. Bert fýra minuttir vóru farnir, tá Birgir Joensen varð spældur beint á nakað uttanfyri brotsteigin. Hann snaraði sær á og langaði til, og so vóru gestirnir á odda.

Og hóast heimaliðið eftir hetta royndi at trýsta nakað, so tóktist hetta ikki geva teir stóru møguleikarnar. Men so brádliga burtur úr at kalla ongum, kom útjavningin kortini. Marek royndi seg við skoti, men tá hetta hálvkiksaði, stakk Ronnie Samuelsen fótin fram, soleiðis at kósin varð beind í málið. Og nakað seinni var Ronnie aftur upp á spæl. Hesa ferð var Marni Djurhuus, sum royndi seg við skoti. Jákup Joensen í vágamálinum fekk vart fyri, men onkursvegna støkk bólturin útaftur, og so hevði Ronnie lætt spæl við at senda í tóma málið.

### Kundu avgjørt

Vágamenn hingu kanska við høvdinum, men tó ikki so leingi. Birgir Joensen megnaði nevnliga aftur at gera um seg fyri steðgin, tá hann fangaði ein returbólt og langaði til uttan møguleika hjá málverjanum, og eftir steðgin tóktust teir hava sett í seg, at nú skuldi tað vera.

Heimaliðið hevði eisini mist nakað av broddi, tá Sorin Anghel var farin skaddur av vøllinum, og tó at talan ikki var um nakra eyðsýnda yvirvág, so lág tað líkasum í luftini, at tað væl kundu verða gestirnir, sum fingu seinasta orðið. Í øllum førum fingu teir størsta møguleikan, tá Sjúrður Ellefsen gjørdist púra leysur inni undir málinum. Hann kendi seg tó nakað kroystan, og gav sær tí ikki neyðugu stundirnar, og ístaðin fór skotið sendandi himmalhøgt upp um málið.

### Málini fella ov lætt

Og so var tað, at lagnan aftur vísti seg frá teirri hørðu síðuni mótvegis einum botnliði. Albert Ari Thomassen og Teitur Joensen kapprunnu báðir eftir eini langari sending. Í tvídystinum fóru teir báðir um koll, og bólturin tóktist vera ávegis av baklinjuni, tá Hans Pauli Petersen fekk fatur á, og onkursvegna fekk hann sneitt bóltin inn um Jákup Joensen, soleiðis at heimaliðið nú aftur var á odda, og bert tveir minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini.

Hetta var sum vátur vøttur hjá gestunum, og tá Egil á Bø so kundi staðfesta úr ellivu metrum í seinasta minuttinum, mundi kenslan vera fullkomin. Ella sum Jóhannis Joensen tók til, tá vit hittu hann á máli um dystin.

– Tað er sama søgan hjá okkum hvørja ferð. Sjálvandi lýgur stigatalvan ikki, men onkuntíð kennist tað, sum um hinir mest sum ikki nýtast at spæla seg til møguleikar, meðan vit hinvegin skulu hava einar tríggjar-fýra av slagnum, bara fyri at skora. Tað er bara einar tvær-tríggjar ferðir í ár, at vit ongan møguleika hava havt fyri stigum, meðan vit í øllum hinum dystunum hava kent tað sera tungt, ikki at fáa nóg stóra úrtøku. Tað er ein ónd ringrás, sum tað er torført at sleppa úr, men vit fara so kortini at royna, helt landsliðsmaðurin sunnukvøldið.

Hjá EB/Streymi var lagið hinvegin sum vera man av tí besta.

– Nú eru vit so enn einaferð bert eitt stig frá KÍ. Tað hava vit so verið fleiri ferðir, men tað er tó kiksa hvørja ferð, helt Egil á Bø.

Sprudur, hvørt leikararnir eisini tosa um møguleikan fyri europeiskum fótbólti, sigur hann, at tað gera teir sum so ikki.

– Men lat okkum nú síggja. Vit hava NSÍ komandi dystin, og tað er sjálvandi ein torfør uppgáva. Men hvør veit. Megna vit at gera okkurt sprell tá, so eru vit heilt nær, men fyri fyrst taka vit tað í øllum førum púrasta róligt, helt hann eftir dystin.

### Dysturin í tølum

***EB/Streymur - FSVágar 4-2 (2-2)***
0-1: Birgir Joensen
1-1: Ronnie Samuelsen
2-1: Ronnie Samuelsen
2-2: Birgir Joensen
3-2: Hans Pauli Samuelsen
4-2: Egil á Bø (br.)

**Dómari:** Petur Skarðenni

**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Gert Joensen, Andrzej Pacek, Egil á Bø, Bárður Olsen – Marni Djurhuus, Ronnie Samuelsen, Marek Wierzbicki, Magni á Lakjuni – Hans Pauli Samuelsen, Sorin Anghel.

**FS Vágar:** Jákup Joensen – Jógvan Hendrik Samuelsen, Jóhannis Joensen, Albert Ari Thomassen, Silva – Birgir Joensen, Hannus Olsen, Ronnie Samuelsen, Jens Erik Rasmussen – Sjúrður Ellefsen, Clayton Soares



*Enn einaferð gekk javnt á hjá FS Vágum, men enn einaferð noyddust teir stigaleysir av vøllinum, og nú er um at gerast heilt tungt at lyfta sær upp um strikuna*

*savnsmynd*

B71-ÍF 1-3 (0-1):

## ÍF fekk gongd á aftur

**Sigurin seinasta vikuskiftið gav helst neyðuga sjálvsálitið, og nú er ÍF aftur seks stig undan næstu kappingarneytunum**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Talan hevur kanska verið um eina lítla kreppu í Fuglafirði, har oddaliðið eftir summarsteðgin tóktist hava ilt við at skava stig saman. Ikki minst mundi tapið á Toftum herfyri vera tungt at gloypa, men við sigrinum á B36 seinasta vikuskifti kom tó nakað av glið á aftur.

Leygardagin vitjaðu teir so á Sandi, har B71 í ár hevur staðið seg óvanliga illani. Og tað eydnaðist ÍF at fáa sigurin til høldar. Miðskeiðis í fyrra hálvleiki legði Eyðolvur Petersen fuglfirðingar framum, men tað tóktist skula gerast enn ein trupul dystur, tá Tummas Pauli Olsen beint eftir steðgin javnaði fyri sandoyingar.

Fram til seinasta korterið ella so gekk eisini javnt á, men so glapp tað brádliga hjá ÍF. Tvey tøtt mál frá Høgna Zachariasen og Ken Bærendsen syrgdu fyri stigunum, og nú er uppflytingin av álvara komin heilt nær til fuglafjørð, eftir at tað í fleiri ár bara hevur verið næstan. Javnleikurin suðuri á Krossinum millum Sumba og TB førdi við sær, at tað nú eru seks stig niður til næst fremsta sessin, og so er spurningurin, hvørt fuglfirðingarnir í ár megna at halda høvdið kaldari, enn teir hava gjørt í endaspurtinum tey bæði seinastu árini.

Hjá sandoyingunum tykist støðan hinvegin at gerast alsamt tyngri. Fyri stóran part hevur tað tó tókst so, at beinleiðis niðurflytingarvandin ikki var so stórur, men nú B68 er farið at skava stig saman, lúrir hesin vandin eisini. Í næst seinasta umfarinum vitjar B71 á Toftum, og so er spurningurin, hvørt hetta verður dysturin, sum avgerð tann spurningin, ella um sandoyingar kanska kortini hava tikið sær av trupulleikanum áðrenn hetta.

### Dysturin í tølum

***B71-ÍF 1-3 (0-1)***
0-1: Eyðolvur Petersen
1-1: Tummas Pauli Olsen
1-2: Høgni Zachariasen
1-3: Ken Bærendsen